Mentamálaráðið
MENTAMÁLADEILDIN

# DEILDARSTJÓRI TIL MENTAMÁLADEILDINA
HÆGRI ÚTBÚGVINGAR, GRANSKING OG MENTAN

**Vit søkja eftir einum dugnaligum og ágrýtnum deildarstjóra, sum vil standa fyri hesum týdningarmikla og spennandi øki.**

**Starvið:**
Í sambandi við at okkara deildarstjóri fer frá vegna aldur, er eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja á Mentamáladeildini í Mentamálaráðnum.

Høvuðsuppgávurnar hjá mentamáladeildini eru m.a. at:

- Fyrisita umsitingina av hægru útbúgvingar-, granskingar- og mentanarstovnunum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingar, og granskingar- og mentanarstovnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv millum skúlar, stovnar o.o.

Deildarstjórin er leiðari av Mentamáladeildini og hevur ábyrgd av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum og stovnum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður/mannagongdir eru í samsvar við nútímans krøv. Deildarstjórin er partur av leiðsluni í Mentamálaráðnum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir hava:

- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevnir, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja til at royna nýggjar leiðir, serliga nú starvsøkið stendur fyri stórum avbjóðingum
- Áhuga fyri avbjóðingum
- Góðar málførleikar, serliga í føroyskum, norðurlendskum og enskum

**Vit bjóða:**
Mentamálaráðið mennist alsamt, og tann, ið verður settur, verður í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarv.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tann, ið verður settur, kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan. Mentamálaráðið arbeiðir við visjónum og hevur týðandi leiklut í visjón 2015.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt í 37. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at verða eitt tænastumannastarv. Lønin er í løtuni kr. 40.972,46 um mánaðin, umframt 15% í eftirløn.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. september 2007 kl. 16.00.

Starvið verður sett skjótast til ber.
Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 555051.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Heimasíða Mentamálaráðsins er: www.mmr.fo
**Mentamáladeildin** umsitur Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúli, Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, Heilsuskúli Føroya, Gransking, Føroya Fornminnissavn, Biofar, Føroya Landsskjalasavn, Landsbókasavnið, Bókasøvn, Kringvarp Føroya, kirkjumál, ítróttur og annað frítíðar- og mentanarligt virksemi. Deildin samskipar eisini ES-útbúgvingar- og granskingarsamstarv.
Í deildini eru 6 starvsfólk.

IÐFLOKKURIN
hvørt vikuskifti í Sosialinum
➤ Hjálpsemi
➤ Umsorgan
➤ Ábyrgd
MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI



Absalon Matras

# Profilurin

**Navn:** Absalon Matras
**Aldur:** 63 ár
**Bústaður:** Norðoyri
**Familjuviðurskifti:** Stakur

Eg arbeiði summarhálvuna sum bussførari, og koyri útlendsk ferðafólk um alt landið. Eisini eri eg bussførari hjá bygdaleiðum.

Tá summarið fer at halla, geri eg túrar við neyðhjálp til Rumenia. Júst hettar, at hjálpa neyðstøddum í Rumenia, er tað sum eg brenni mest fyri, og fari eg í summar undir túr nummar fimti. Árliga koyri eg eini 40-50 tons av klæðum úr Føroyum til Rumenia.

Í tey 13 árini eg havi koyrt til Rumenia, havi eg upplivað mangt og hvat, og er longsulin til at hjálpa har, bert vaksin við árunum. Eitt av mínum størstu hjartamálum er, at itøkiligar menningar verkætlanir, verða settar íverk í londum sum eitt nú Rumenia. Hesar kundu til dømis verið at fingið skipaðið viðurskiftir, við vatnleiðingum so fólkið kann fáa reint vatn. Sjúkur sum standast av dálkaðum vatni, tykist at verða ein afturvendandi trupulleiki har.

Á seinastu ferð míni í Rumenia, var tað hugstoytt at síggja, at hóast Rumenia nú er vorðið ein partur av EU, er ongin broyting enn at hóma, hvat viðvíkur fátækradøminum. Tá eg spurdi onkran hvussu tað var at gerast partur av EU, var svarið, at tað helst fóru at ganga eini 30 – 35 ár áðrenn nøkur beinleiðis hjálp til fólkið fór at hómast.

Tann stuðul í latin verður frá EU, verður í løtuni nýttur til at nýmótansgera vegakervið gjøgnum Rumenia. Hettar verður gjørt við handilsligum áhugamálum í huga, til frama fyri restina av EU. Mín vón er, at vit sum búgva her á landi og eru so vælsignaði við allari vælferð, ikki lata okkara part liggja eftir hvat menningar og neyðhjálpini viðvíkur.

**Eg velji miðflokkin**, tí har kenni eg at míni kristnu lívssjónarmið verða gingin á møti, og at tann førdi politikkurin er í trá við tað sum eg brenni fyri, m.a. hetta, at síggja virðið einstaka menniskjans. Eisini gongur miðflokkurin inn fyri at menningar og neyðhjálpin frá almennu Føroyum skal gerast enn størri.

**Visti tú at:**

• 1,2 mia. av heimsins 6 mia. íbúgvum liva í djúpastu armóð og hava minni enn 6 kr. at liva fyri dagliga. Og at 3 mia. liva fyri minni enn 12 kr. um dagin.

• 30.000 børn doyggja dagliga vegna vánaligar heilsuumstøður og hungur.

• Árliga doyggja 500.000 kvinnur runt heimin, vegna vánaligar umstøður í sb. v. barnsburðir.

www.midflokkurin.fo

HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?
Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00
Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum




